



# Tú kemur ikki bakkandi inn í framtíðina

## IT-supportarar, netumsitarar, tøkningar og KT-tøkniráðgevar til Senta

*Senta er við at umskipa arbeiðsháttt sín fyri veruliga at kunna veita bestu tænastuna á sínum øki. Tí tørvar okkum fleiri góð fólk – og vit vilja fegin, at tú verður teirra millum.*

**Tú**
Tú brennir fyrst og fremst fyri fakinum og hevur royndir antin sum IT-supportari, netumsitari, tøkningur ella KT-tøkniráðgevi. Tú dugir væl at loysa trupulleikar, arbeiðir sjálvstøðugt eins væl og í toymi og finnur fram um alt gleði og stoltleika í tí góða handverkinum. Tað er sjálvandi ein fyrimunur at hava viðkomandi útbúgving, men ikki ein treyt. Tað er fyrst og fremst tínum evnum og gávum, vit hava brúk fyri.

**Vit bjóða**
Vit bjóða tær eitt spennandi, dynamiskt og professionelt arbeiðspláss, har tú saman við dugnaligum starvsfeløgum tænir nøkrum av landsins størstu fyritøkum við fjølbroyttum loysnum innan t.d. VmWare, virtualisering, MS Exchange Server, SAN-loysnir, netinfrastruktur, trygd, hosting o.a. Vit geva tær eisini eitt gott høvi at menna tínar førleikar við eitt nú Microsoftgóðkenning, møguleikar at arbeiða við fleiri av heimsins kendastu merkjum, eins og tú fært ávirkan á egnan arbeiðsdag og góða løn.

**Forvitin?**
Vilt tú vita meira um eitt av størvunum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Árna Elttør, deildarleiðara, tlf. 347 200, ael@senta.fo.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum skulu sendast til Senta, HR-deildin, Postboks 109, 110 Tórshavn og skulu vera okkum í hendi áðrenn 26. mars 2008.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Senta er samanrenningin av Com-Data, Farodane og Atlants Tøkni og er ein framsøkin fyritøka, sum grundar virksemi sítt á opinleika, áræði, førleika og passión. Vit vilja í øllum lutum útvega kundum okkara í Føroyum og uttanlands eina betri stýring og harvið ein størri vinning í gerandisdegnum, bæði fíggjarliga, tøkniliga og umsitingarliga.*

*Missiónin hjá Senta er at gera kunningar- og samskiftistøkni møguliga og lætt atkomuliga fyri øll, so at hon gerst ein jalig uppliving hjá brúkaranum og ein fyrimunur hjá virkjum at nýta.*

*Senta hevur deildir í Tórshavn, Saltangará og Klaksvík og veitir teldutøkni, KT-skipanir, ráðgeving og tøknitænastur til vinnulívið. Hjá Senta starvast uml. 70 fólk.*

SENDISTOVAN

BETRI STÝRING. STØRRI VINNING.

SENTA®

Tlf. +298 347 200 · www.senta.fo